# Havnin fagnaði stjørnuni

**Sunnudagin fagnaði Havnin stjørnuni, Guðruni Sólju Jacobsen, tá hon var á palli í SMS. Torgið var stúgvandi fult av fólki í øllum aldri, og tóku øll serstakliga væl ímóti vinnaranum av »Stjerne for en aften«**

STJØRNURÓMUR
*Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Jens Kr. Vang*



*Júst hvussu nógv í tali fólkini, ið vóru møtt upp í SMS er ilt at siga. Men fleiri hundrað vóru tey í øllum førum í tali*

Havn: Beinanvegin sum tað varð greitt, at vinnarin av donsku sendingini »Stjerne for en aften« var føroyingur, kundi síggjast á sjónvarpsskíggjanum, at Guðrun skuldi leygardagin syngja í Fredriksberg-centret í Keypmannahavn, og sunnukvøldið klokkan 18 sluppu føroyingar endiliga at fagna henni, tí tá skuldi hon syngja í SMS.

Longu langt áðrenn klokkan var seks sunnukvøldið var stúgvandi fult av fólki í SMS. Tey, ið vóru eitt sindur sein á veg, fingu onki parkeringspláss, og ein rúgva av barnavognum stóðu eisini uttanfyri tær ymsu inngongdirnar.

## Fløgg

Útvarp Føroya fylgdi væl við Guðruni. Ígjøgnum hátalararnar, sum vóru settir upp á torginum í SMS, hoyrdu øll, ið vóru savnað saman har, júst hvar Guðrun var, og nær hon kundi væntast at koma inn í SMS.

Áðrenn tiltakið byrjaði gingu fólk runt og býttu fløgg út til børnini, so rættur veitsludámur kom á.

Klokkan var farin av seks, tá endiliga okkurt hendi á pallinum. Og sigast kann við vissu, at verri enn so øll sóu, hvat gekk fyri seg.

Heðin Mortensen helt fyrst vegna Tórshavnar Býráð eina røðu fyri Guðruni og handaði henni eina gávu. Og tá Guðrun trein á pallin hoyrdist ikki nógv annað enn skríggj og róp, og fløggini komu so sanniliga til sín rætt.

Eisini handaðu tvær fittar smágentur Guðruni eina gávu frá Føroya Banka. Onnur gávan var silvur til tann føroyska búnan.

Síðani skuldi slapp hon endiliga at syngja, og sang Guðrun vinnaralagið »Promise me« og sangin, sum fekk hana víðari frá hálvfinaluni »Hero«.

Fólk í øllum aldri vóru komin at fagna 20 ára gomlu tvørágentuni, nú hon endiliga trein aftur á føroyska jørð. Ikki var heilt frítt, at hon sá eitt sindur troytt út, men sum altíð bar hon tað væl, og sveik ikki álitið. Tá liðugt var at syngja, skuldi Guðrun skriva autografar, og 3´arin var á torginum við fløguni »Stjerne for en aften«. Og uttan iva vóru nógvir autografar festir á blað áðrenn leiðin gekk aftur til heimbýin Tvøroyri.



*Eisini vóru autografar skrivaðir, og tað vóru nógv, ið vildu nýta hetta høvið*



*Og sjálvandi skuldi Guðrun eisini syngja fyri teimum nógvu fólkunum, sum vóru komin at fagna henni í SMS*



# 3000 suðuroyingar fagnaðu Guðruni

**Meiri enn annarhvør suðuroyingur var møttur í ítróttarhøllini á Tvøroyri at heiðra Guðruni, tá ið hon kom heimaftur sunnukvøldið**

STJØRNA EITT KVØLD
*Áki Bertholdsen*



*Guðrum takkaði hjartaliga fyri móttøkuna á Tvøroyri og hon sang eisini fyri teimum 3.000 fólkunum, sum vóru komin saman í høllini at heiðra henni. Við rygginum til er tað sjóvarp Føroya, sum tekur upp og hin myndamaðurin er frá Danmarks Radio*

Tað var verri enn nøkur drotningavitjan, tá ið Guðrun Jacobsen kom heimaftur til Tvøroyrar eftir at hava vunnið sangkappingina Stjørna eitt kvøld hjá Danmarks Radio.

Almenn móttøka var í ítróttarhøllini í Trongisvági og har var eisini stúgvandi fult av fólki. Mett var at eini 3.000 fólk vóru samankomin í ítróttarhøllini. Í øllum førum var semja um, at talan var helst um størstu mannfjøld, sum nakrantíð var samankomin í høllini og kanska til nakað tiltak á Tvøroyri yvirhøvur.

Sostatt var annarhvør suðuroyingur farin frá húsum at bjóða Guðruni vælkomnum heimaftur.

Atlantsflog hevði tyrluna til taks og hon fleyg Guðruna suður, so at tey settu seg á bilaplássinum við ítróttarhøllina klokkan hálvgun níggju sunnukvøldið.

Tá ið næstringarnir høvdu tikið ímóti henni, spældi hornorkestrið eitt stykki í túninum, áðrenn farið var undir tak, tí kølið var hetta kvøldið.

Á samkomuni helt Kristin Michelsen eina stutta røðu, har hann vísti á týdningin, sum hetta hevði, ikki bara fyri Tvøroyri og Suðuroynna, men fyri allr Føroyar, tí hann helt, at tað lá eitt ómetaligt lýsingavirði í einum slíkum avriki og hann helt, at Guðrun var eitt virðiligt umboð fyri okkara land.

Henn segði, at øll vóru stolt av Guðruni. Men hann minti hana eisini á, at tað kundi vera kalt á toppinum, so hann bað hana eisini ansa væl eftir sær.

Á Tvøroyri er eisini eitt annað tónlsitarligt stjørnuskot, Brandur Enni. Hann var eisini komin at ynskja Guðruni tillukku og vælkomnum heim og tað gjørdi hann við sanginum, »The Way I Am«, sum hann sjálvur hevur skrivað.

Og sjálvsagt mátti Guðrun eisini á pallin at syngja teir báðar sangirnar, hon sang í kappingini, »Hero« og »Promise Me«. Hon sang eisini nakrar sangir við Gospelkórinum, sum eisini var á palli hetta kvøldið.

Og tað var ikki smávegis av gávum, Guðrum fekk. Frá Tvøroyrar Býráð fekk hon ein kekk upp á 10.000 krónur. Tað sama fekk hon frá Suðuroyar Sparikassa og frá klædnahandlinum, CN Wear, fekk hon eitt gávukort upp á ókeypis klæðir í eitt heilt ár.

Við á á móttøkuni í Suðuroy vóru eisini Sjónvarp Føroya og Danmarks Radio so okkurt verður væntandi á skíggjanum komandu dagarnar. Útvarpið var eisini við og sendi beinleiðis.



*Á Tvøroyri fekk hon eisini handað diplom sum prógv um at hon hevði vunnið kappingina*



*Charlotta Nielsen, sum hevur klædnahandilin CN Wear, gav Guðruni eitt gávukort uppá ókeypis klæðir eitt heilt ár. Tað er altso Charlotta sum stendur høgrumegin. Guðrun fekk eisini gávur frá Tvøroyrar Býráð og frá Suðuroyar Sparikassa*



*Fyrstur at ynskja henni tillukku og vælafturkomnan, var pápin, sum gav henni eitt ordans klemm*



*Foreldrini og omman saman aftur við Guðruni eftir nakrar rokaligar dagar. Frá vinstru eru tey pápin, Ási, Guðrun, omman, Jonna og mamman, Gitte*